**6. Bjargingarviðurskifti.**

**6.1. Bjargingarop.**

6.1.-1 Bjargingarop eru vindeygu, lemmar og dyr íútveggi og tekju, har fólk kunnu bjargast út, og har eisini bjargingarfólk kunnu sleppa inn.

6.1.-2 Sløkkiliðsfólk skulu kunna sleppa framat bjargingaropum, t.d. við stigum. Rimar, vindfang, sólskermar o.a. mugu ikki vera ein forðing fyri at síggja ella nýta bjargingarop.

6.1.-3 Bjargingarop skulu lættliga og uttan nakra forðing kunna latast upp og skulu kunna standa víðopin, so slepst um tey bæði út og inn.

6.1.-4 Bjargingarop skulu vera íminsta lagi 60 cm høg og 50 cm breið. Tó skal hædd og breidd tilsamans vera ikki minni enn 150 cm. Er hæddin frá lendi upp til bjargingarop minni enn 200 cm, kann hæddin á sjálvum bjarginaropinum vera 50 cm. Er hæddin frá lendi upp til bjargingarop í tekju meiri enn 9 m, skal hæddin ásjálvum bjargingaropinum vera ikki minni enn 80 cm.

6.1.-5 Íbygningum, har tað er hægri enn 9 m millum lægsta jørðildi og bjargingarop íovastu hædd, skulu bjargingarop íøllum hæddum, uttan ítekju, vera dyr, vippuvindeygu, síðuhongd vindeygu, lúkur ella dragivindeygu við opum í minsta lagi sum ásett í-4.

6.1.-6 Frá gólvi upp til undirkant á bjargingaropi skal ikki vera hægri enn 120 cm.

6.1.-7 Áloftum har gólvið er hægri enn 5,5 m (2 hæddir omanfyri) lægsta jørðildi, skulu bjargingarop ítekjum og kvistum, vera soleiðis háttað og sett, at tað, mált vatnrætt frá takskeggi inn til niðara kant ábjargingaropi, ikki er longur enn 1,4 m. Hevur opið sama hall sum tekjan (takvindeygu), skal innandura vera íminsta lagi 20 cm vindeygakarmur, ella trin ikki hægri enn 80 cm yvir gólvinum og ímesta lagi 40 cm niðanfyri bjargingaropinum.

**8.4. Bjargingarviðurskifti.**

8.4.-1 Búðstaðarhøli og køkar skulu hava dyr beinleiðis út ella bjargingarop samb. 6.1.. Hæddir upp til bjargingarop samb. 6.1.-6 kunnu mátast frá føstum innbúgvi t.d. borði, ið stendur undir bjargingarvindeygunum. Borðplátan skal tá vera minst 50 cm breið.

8.4.-2 Kravið um bjargingarop - ella vindeyga eins og ásett í-1. kann verða fráfallið, um tað ávísa rúmið hevur beinleiðis samband við íminsta lagi 2 onnur rúm, sum hava bjargingarop og sum ikki standa ísambandi hvørt við annað.

8.4.-3 Tilkoyringarvegir og øki til bjargingar skal vera eins og ásett í6.2..